

*Nichels Lützen var næsti maður Faktorin í nógv ár. Tí komu hansara børn og næstringar at vera nógv um Egil.*



*Versonur Nichels, Mourits Winther, var millum tey fyrstu at vitja Egil, tá ið hann kom aftur úr Danmark*



*Jógvan Kjølbro, sum byrjaði sítt vinnuliga virksemi hjá Faktorinum var eisini millum tey fyrstu, sum vitjaðu Egil*



*Nólsoyarstova avmyndað í 1902 av Petur Alberg*



*Her eru tey av Krákusteini, sum tóku sær so nógv av Egili.*
*Sitandi f.v.: Anna Julina og Søren saman við teirra børnum Albert, gudsonur Egil, og Thorstein*
*Standandi: Charlotta, Petur Hans og Anna Malena*

morgunin eftir.

Læknin segði Egili, at hann mátti rokna við at verða innlagdur í 6-7 mánaðir.

Viðgerðin var tann sama, sum vit kenna frá Hoydølum. Tað var at liggja í opnum "hallum" fyri at fáa nógva fríska luft. Men her var ofta sera kalt. Hetta førdi javnan til krím við fepur.

Onkuntíð komu sjónleikarar frá Vordingborg at hava undirhald fyri sjúklingunum. Men her var tað eisini so kalt, at Egil viðhvørt mátti í songina við fepuri dagin eftir.

Tað sæst greitt í dagbókini, at her treivst Egil ikki væl. Hann skrivaði heldur ikki so dúgliga dagbók.

Hann skrivaði tann 3. Februar við yvirskriftini "Faxinge Sanatorium." Næstu ferð skrivaði hann sum yvirskrift "Isslottet, den 26. Februar."

## Mamman kemur á vitjan

Egil skrivaði so ikki aftur fyrr enn 5. Mai, tá ið hann hevði føðingardag. Tá fekk hann vitjan:

"Den 5the Mai fik jeg Frikur, da jeg havde Besøg af Moder. Hun havde imidlertid ikke ret megen Tid tilovers, thi hun kom med 1 toget, men tog afsted igen med 4 toget (men hetta var tó frægari enn einki. Hetta var fyrstu ferð hon vitjaði meg og bleiv eisini síðstu ferð, meðan eg var á sanatoriinum, eg var tó í sjey mánaðir har.")

Jeg var imidlertid i godt Humør, thi det passede akkurat saaledes, at jeg fik Brev hjemmefra tilligemed 25 Kroner i fødselsdagsgave, foruden en stor pakke Konfekt og Telegram, som ganske vist ankom den 6te. Det gjorde dog den samme Virkning."

Tað kann sigast at vera løgið, at mamman gjørdi so lítið av at vitja, tí hon tyktist at hava verið nógv um hann í Keypmannahavn.

## Sjúklingarnir klaga

Tað var stór ónøgd millum sjúklingarnar á sanatoriinum. Teir sendu tískil eina langa grein til blaðið Politiken um viðurskiftini, har 110 sjúklingar skrivaðu undir. Egil var ein av teimum.

Yvirskriftin var:
**Hvad faar Staten for de hundrede tusinder de giver til Nationalforeningen??**

Her varð hugsað um tuberklafelagið, sum rak sanatoriið. Hetta var undir 1. heimsbardaga, tá ið tað eisini var fíggjarkreppa, og tað mátti sparast.

Sjúklingarnir hildu, at hesar sparingar raktu teir alt ov nógv. "Men maaske mangler de Ledende ogsaa Vilje og Energi til at bekæmpe disse Vanskeligheder."

Serliga varð klagað um matin, sum júst fyri tuberklasjúklingar hevði so stóran týdning. Sjálvt havragreyturin var illa etandi.

Kuldin var eisini ein stórur trupulleiki, sum vist hevði gjørt av við teir vánaligastu sjúklingarnar.

Loysnin kundi verið, at staturin beinleiðis yvirtók sanatoriini.

Annars gekk lívið sína gongd. Tá ið Egil var so frægur, var hann uppi. Hann gekk túrar og drakk viðhvørt eina øl saman við onkrum, ið hann kendi. Hann skrivaði bræv heim til abban, fastrina Magdalenu og pápabeiggjan Johs. Hann skrivaði eisini til Ingeborg Lützen, dóttir Nichels, sum hann tyktist at kenna sera væl. Hann skrivaði somuleiðis til Jógvan Húsgarð. Egil tykist at hava serliga gott samband við Húsgarðfamiljuna í Gøtu, og verður komið aftur til tað. Eisini skrivaði hann til skyldkonuna Sonnu Kjelnæs og til mammuna og ommuna í Keypmannahavn.

Eina ferð skrivaði hann, at "vi havde en lille konsert. Otte Mands Orkester."

## Tað gongur ongan veg

Tann 6. juni varð Egil kannaður av lækna. Hesin kundi bert siga, at sjúkan stóð í stað, gjørdist hvørki betri ella verri. Tað kundi vara bæði stutt og leingi, tað var so ymiskt við tí.

Annars fekst Egil við at telva við sínar medsjúklingar. Hann bæði vann og tapti. Ofta hevði hann pínu í høvdinum og rygginum.

Tann 10. Juni hevði hann lagt seg uttanfyri væl innballaðan og føldi seg væl. Knappliga fór hann at upp at skelva og føldi, at hann hevði nógvan fepur.

"Gik saa lige op paa Sovestuen i Haab om at træffe Reservelægen, da jeg vidste han endnu ikke havde været Stuegang. Selvfølgelig traf jeg Marie paa Gangen, der som sædvanligt gjorde et allerhelvedes Vrøvl om, at jeg turde vove mig op paa 1. Sal ved denne Tid. Jeg nedværdigede hende saamænd ikke et Svar, gik blot roligt ind paa min Stue."

Læknin kom framvið og segði, at hetta var bert hálskatar. Egil mátti í song í fleiri dagar og fekk illa etið.

## Aftur til Keypmannahavn

Tann 26. juni fór Egil til Keypmannahavnar, har hann skuldi fáa kanna bandaguna. Hansara gomlu vinir tóku ímóti honum.

Hann skuldi búgva á Vanførhjemmet, men hetta dámdi honum als ikki. Hann hevði skrivað til mammubeiggjan um at